

## Andrew og teir taptu stórt

Fremad Amager spældi leygarmorgunin fyrsta venjingardystin í fyrireikingini til nýggja kappingarárið í Danmark, sum byrjar um tríggjar vikur. Fremad Amager vitjaði hjá AaB í Aalborg, og dysturin endaði við stórsigri til AaB, sum spælir í eini deild hægri enn Fremad Amager. AaB vann dystin 5-0. Hvørgin av teimum føroysku spælararunum í AaB vóru við í dystinum, tí teir eru skaddir. Andrew av Fløtum var ein av spælarunum, sum spældi fyri AaB í hesum dystinum. Tá ið tað manglaðu 11 minuttir av dystinum, var AaB frammanfyri 2-0, men seinatu løtuna skoraðu teir tríggjar ferðir afturat.

## Klinsmann hugsar seg um

Týski landsliðsvenjarin Jurgen Klinsmann hevur ikki gjørt av, um hann vil halda fram í starvinum hjá týska fótbóltssambandinum. Týskland stóð seg væl undir HM-endaspælinum á heimavølli, og týska fótbóltssambandið vil hava Klinsmann at halda fram sum venjari.

- Tað er hent so nógv seinastu dagarnar, at eg havi ikki fingið hugsað meg um. Gev mær nakrar dagar afturat, sigur Klinsmann.

Tað sigst annars, at Klinsmann hevur fingið tilboð um at gerast landsliðsvenjari hjá USA, um hann gevst í Týsklandi. Klinsmann býr í USA, haðani kona hansara eisini er ættað.

# Gott festival upplegg í Klaksvík

*KÍ*

*Skála*

**Fyri aðru ferð í ár eydnaðist tað KÍ at fáa fult á heimavøllinum, har teir í næstu royndini skulu spæla festival fótbólt móti oddaliðnum**



*Fyri aðru ferð í ár eydnaðist tað KÍ at vinna á heimavølli, tá ið Skála var á vitjan sunnudagin*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

**KÍ-SKÁLA**

*Jóannes Hansen*

Tað var góða lag í fína summarveðrinum í Klaksvík sunnudagin. Kanska var leikliga avrikið ikki so nógv at rópa hurrá fyri. Men tað ganga tey neyvan so høgt uppí í Klaksvík. Undan sunnudegnum hevði KÍ bara vunnið eina ferð á heimavølli í ár. Tað var 23. apríl, tá ið teir í Klaksvík í 5. umfari vunnu 3-0 á VB/Sumba.

2-1 sigurin móti Skála ber við sær, at KÍ aftur er við í stríðnum um heiðursmerkini. Nú er KÍ farið í tvær vikur summarfrí. Hvat heystið skal snúgva seg um verður ikki minst treytað av, hvussu tað fer at hilnast í næstu royndini. Hon verður eisini á heimavølli. 5. august verður EB/Streymur mótstøðuliðið. Hetta verður festival sunnudagin, og um veðrið fer at skikka sær hampuligt, so er einki at ivast í, at áskoðarametið fer at verða hótt.

Tvær tær seinastu ferðirnar hevur Skála megnað javnleik móti bæði toppliðnum EB/Streymi og GÍ. Tá vóru góðir leikligir glottar at hóma. Soleiðis var tað ikki í Klaksvík, har Skála tóktist linligt og møguliga við ov nógvum fokus á Svangaskarði, har teir hósdagin fyri fyrstu ferð nakrantíð skulu spæla í UEFA Cup.

### Spenningur í alla tíðina

Heimaliðið, sum hevði Hjalgrím Elttør á beinkinum, meðan Kristoffur Jacobsen í ein tíma fekk høvi at royna seg í høgra miðvallarborði, legði fyri sum ódnarveður. Talan var leingi um støðugt trýst á Skála málið. Spentar støður stóðust eftir deyðbóltar, men tað gekk illa at spæla seg til upplagdan málmøguleika.

Skála dúvaði upp á snarálop, og tað var um reppið, at tað eydnaðist teimum at leggja seg framum, áðrenn KÍ fekk hol á. Pauli G. Hansen stakk fram til Boga Gregersen í vinstra borði, innleggið frá honum var flatt og neyvt, Jónhard Frederiksberg fekk skot á, og Meinhardt Joensen bjargaði væl til horna.

Eftir stóran hálvan tíma fekk KÍ hol á. Aftastu sentralu spælararnir áttu málið. Atli Danielsen, sum miðvallari, legði fríspark úr vinstru í brotsteigin, har aftasti KÍ verjuskansin, Sinisa Jovanovic, tveitti seg fram og við høvdinum stýrdi bóltinum í málið aftanfyri stinna Vlada Filipovic.

Hóast KÍ hevði bóltin størsta partin av tíðini, og hóast Skála var friðarligt og ikki so ofta megnaði at spæla seg til møguleikar, so kendist nervin støðugt. Sinisa Jovanovic var framsíggin og tryggur aftasti KÍ verjumaður, og Jónhard Frederiksberg, Bogi Gregersen og Alexandur Johansen høvdu ikki langar teymar.

2. hálvleikur var summarfrítíðar kendur. KÍ hevði bóltin nógv, men klaksvíkingar megnaðu ikki at spæla seg til upplagdar málmøguleikar. Skála verjan var stinn, og treytirnar hjá Clapson og Lundberg í fremstu KÍ røðini vóru ikki góðar.

Tíggju minuttir eftir steðgin var um reppið, at Skála eftir margháttliga støðu fekk javnað. Heðin á Lakjuni var óheppin, tá ið hann í egnum brotsteigi royndi at rudda burtur. Hann sat mest sum við bóltinum millum beinini, og tað var um reppið, at Poul N. Poulsen megnaði at prika bóltin í kassan.

### Gamal heilivágur

Fyrr í ár spældi KÍ mest sum bara við longum sendingum. Seinastu dystirnar hava klaksvíkingar roynt fram eftir vøllinum og við nógvum stuttum sendingum. Tá ið teir øktu til 2-0 var talan um langa sending. Paul Clapson var fyrstur á, hann legði tvørtur um til Christian Lundberg, sum dró eitt sindur, áðrenn hann smekkaði til, og bólturin streyk inn við stólpanum.

Tað restaðu seytjan minuttir, og heimasigurin kendist vísur. Tað gjørdi hann bara í sjey minuttir. Debus Danielsen, sum var innskiftur, tá ið seinna umfarið var tíggju minuttir gamalt, var væl upplagdur hjá Skála. Hann lá fleiri ferðir framvið, og tað eydnaðist hjá honum, tá ið tað restaðu tíggju minuttir. Væl upplagdi Levi Hanssen stríddi seg til baklinjuna í høgru, legði innfyri, og Debus Danielsen stýrdi bóltin í kassan.

Heimafólkið kendi kanska trýst á sær, men skálamenn vóru ongantíð rættuliga vandamiklir. Síðstu fimm minuttirnar stóð Christian Lundberg fyri tað mesta við bóltinum undir hornaflagginum. Seinna gula kortið kostaði Arnholdi Berg leikbann næstu ferð, tá ið Skála skal spæla á heimavølli móti B36.

## Illa skerdir á Skála

Jónhard Frederiksberg staðfesti, at hetta avrikið ikki hevði verið á hædd við tey, sum Skála hevur sýnt seinastu ferðirnar:

– Vit vóru óvanliga tamir, og hóast tað ikki var so ógvuliga nógv ferð yvir KÍ, so høvdu teir sigurin uppibornan. Kanska hevði tað tikið seg øðrvísi upp, um Meinhardt Joensen ikki hevði havt bjargað so framúr væl, sum hann gjørdi, tá ið eg fekk høvi at royna móti málinum eftir skjótálop.

Hugsaðu tit ov nógv um UEFA Cup?

– Tað høvdu vit avrátt, at vit ikki skuldu gera. Nú hugsa vit um Start. Í kvøld fara vit at venja á Toftum. Hetta kenna vit sum spennandi avbjóðing, sigur Jónhard Frederiksberg.

Í Klaksvík saknaðu skálamenn Bárð Danielsen umframt bæði Bjarna Jørgensen og Pætur Dam Jacobsen.

– Vit hava ikki ov nógv av fólki, og tað kennist eyka meint, at ein lyklaspælari verður skaddur afturat, tá ið tveir frammanundan sita uttan fyri, heldur landsliðsspælarin.

## Summarfrítíðin kemur illa við

Klaksvíkingar hava havt viðrák seinastu vikurnar. Tí er tað ikki so undarligt, at teir einki høvdu havt ímóti, at alt var, sum tað skuldi havt verið:

– Vit høvdu einki havt ímóti at spælt tvær hálvfinalur í steypakappingini móti Skála nú. Tær eru útsettar, og nú hava vit fingið frí frá venjing í tvær vikur. Talan er kortini ikki um púra at halda frí, tí allir spælararnir hava fingið venjingarætlan at hava við í frítíðini, sigur KÍ liðformaðurin Heðin á Lakjuni.